FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

# Dagførd inntøkumeting til uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 2019

## Inngangur

Fíggjarmálaráðið hevur gjørt dagførdar metingar av inntøkujáttanunum, nú í desember í mun til september, tá fíggjarlógaruppskotið varð lagt fram. Niðanfyri verður greitt frá teimum inntøkujáttanum, sum Fíggjarmálaráðið metir fara at víkja frá fíggjarlógaruppskotinum fyri 2019. Samanlagt er talan um meirinntøkur á 30,5 mió. kr. samanborið við fíggjarlógaruppskotið.

| Grein | Konta | Høvuðskonta | sep 18 | Nýggj meting | des 18 |
|---|---|---|---|---|---|
| 20 | 52101 | Vanligur landsskattur (Ógreinað j.) | 1.543.000 | 72.000 | 1.615.000 |
| 20 | 52107 | Felagsskattur (Ógreinað j.) | 350.000 | 5.000 | 355.000 |
| 20 | 52201 | Meirvirðisgjald (Ógreinað j.) | 1.631.500 | -45.500 | 1.586.000 |
| 20 | 52207 | Punktgjøld (Ógreinað j.) | 195.000 | 9.000 | 204.000 |
| 20 | 52213 | Brennioljugjald (Ógreinað j.) | 71.000 | 5.000 | 76.000 |
| 20 | 52219 | Skrásetingargjald (Ógreinað j.) | 190.000 | -15.000 | 175.000 |
| | | | | **30.500** | |

## Dagførd inntøkumeting

### Vanligur landsskattur

Dagførd meting er, at inntøkurnar frá vanligum landsskatti verða 72 mió. kr. hægri í 2019 enn mett í fíggjarlógaruppskotinum. Grundarlagið fyri metingini er gongdin í 2018 framskrivað við 4,5%.

### Felagsskattur

Dagførd meting er, at felagsskatturin verður 5 mió. kr. hægri í 2019 enn mett í fíggjarlógaruppskotinum. Grundarlagið fyri metingini er gongdin í 2018 við innroknaðum fyrivarni.

### Meirvirðisgjald

Dagførd meting er, at meirvirðisgjaldið verður 45,5 mió. kr. lægri í 2019 enn mett í fíggjarlógaruppskotinum. Grundarlagið fyri metingini er gongdin í 2018 framskrivað við áleið 3%, umframt mettur inntøkuvirknaður frá lógaruppskoti, sum er til viðgerðar í Løgtinginum.

### Punktgjøld

Dagførd meting er, at inntøkurnar frá punktgjøldum verða 9 mió. kr. hægri enn mett í fíggjarlógaruppskotinum. Grundarlagið fyri metingini er gongdin í 2018.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

**Brennioljugjald**
Dagførd meting er, at inntøkurnar frá brennioljugjaldi verða 5 mió. kr. hægri enn mett í fíggjarlógaruppskotinum. Grundarlagið fyri metingini er gongdin í 2018.

**Avgjald á fiskatilfeingi**
Grundarlagið fyri metingini av inntøkunum frá avgjaldi á fiskatilfeingi er framhaldandi í samljóð við uppskotið til veiðugjaldslóg, sum er til viðgerð í Løgtinginum. Tað ber ikki til at gera nýggjar metingar, fyrrenn Løgtingið hevur endaliga tikið støðu til, hvørji veiðigjøld verða galdandi fyri 2019. Hetta merkir, at tað er ein óvissa í inntøkunum í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2019.

**Skrásetingargjald**
Dagførd meting er, at inntøkurnar frá skrásetingargjaldi verða 15 mió. kr. lægri enn mett í fíggjarlógaruppskotinum. Grundarlagið fyri metingini er gongdin í 2018 við innroknaðum fyrivarni.

Tinganes, 7. desember 2018

**Kristina Háfoss**
landsstýriskvinna

/ **Bjarni Askham Bjarnason**